# Mentamálaráðið
VINNU- OG MIÐNÁMSSKÚLADEILDIN

## DEILDARSTJÓRI TIL VINNU- OG MIÐNÁMSSKÚLADEILDINA

**Vit sóknast eftir einum dugnaligum, ágrýtnum og framskygdum deildarstjóra at standa á odda fyri vinnu- og miðnámsútbúgvingunum**

**Starvið:**
Nú deildarstjóri okkara fer úr starvi er eitt áhugavert, spennandi og fjølbroytt starv sum deildarstjóri leyst at søkja í Vinnu- og miðnámsskúladeildini í Mentamálaráðnum.

**Høvuðsuppgávurnar hjá Vinnu- og miðnámsskúladeildini eru m.a. at:**
- Fyrisita hægru umsitingina av vinnu- og miðnámsútbúgvingum
- Leggja til rættis og menna útbúgvingarnar á økinum
- Ráðgeva landsstýrismanninum, aðalstjóranum o.ø. og vegleiða í spurningum innan økið,
- Tilevna uppskot til lógir, kunngerðir, reglur o.a.
- Samskipa virksemið við tilknýti til økið við aðrar deildir, stovnar og áhugabólkar
- Fremja samstarv við vinnulívið o.o., ið varða av økinum
- Standa fyri dygdarmenning og KT í skúlaverkinum
- Stíla fyri leiðslumenning og -skeiðum

Deildarstjórin er leiðari í Vinnu- og miðnámsskúladeildini, og hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni, menningini av deildini og teimum útbúgvingum og stovnum, ið eru og koma á økinum. Deildarstjórin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at bygnaður og mannagongdir eru í samsvari við nútímans krøv. Deildarstjórin er partur av leiðsluni í Mentamálaráðnum. Deildarstjórin luttekur í norðurlendskum skúlasamstarvi og hevur ábyrgdina av skúlabygging innan økið.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a. at umsøkjarar hava:
- Viðkomandi útbúgving frá lærdum háskúla
- Leiðsluroyndir frá tí almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum
- Góð leiðslu- og samstarvsevni, umframt mennandi leiðslustíl
- Førleika til at menna samstarvið við vinnulívið og aðrar áhugabólkar
- Vilja og evni til at royna nýggjar leiðir, serliga nú starvsøkið stendur fyri stórum avbjóðingum
- Áhuga fyri avbjóðingum
- Góðar málførleikar, serliga í føroyskum, norðurlendskum og enskum

Mentamálaráðið mennist alsamt og verður tú sjálv/sjálvur í stóran mun við til at skapa starvið.

**Vit bjóða:**
Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir, umframt uttanlands-samstarv.

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi og møgu-leikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tann, ið settur verður, kemur at arbeiða í einum spenn-andi umhvørvi tætt saman við politisku myndugleikunum og stovnum innan undirvísing, gransking og mentan. Mentamálaráðið arbeiðir við visjónum og hevur týðandi leiklut í visjón 2015.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður lønt í 37. lønarflokki hjá Tænastumanna-felag Landsins, tó uttan at verða eitt tænastumannastarv. Harumframt verða 15% goldin í eftirlønargjaldi.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um stjórnarráðini og Løgmansskrivstovuna.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø skulu sendast til:

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella mmr@mmr.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 24. september 2007, kl. 16.00. Starvið verður sett frá 1. november 2007 ella eftir nærri avtalu.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Petur Petersen, aðalstjóra í Mentamálaráðnum, á tlf. 55 50 51.

sansir.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.
Í **Vinnu- og miðnámsskúladeildini** eru Studentaskúlar, HF-skeið, Handilsskúlanir, Teknisku skúlarnir, Fiskivinnuskúlin, Vinnuháskúlin og Yrkisdepilin (lærlingaútbúgvingar). Deildin stílar fyri KT og dygdarmenning í undirvísingarverkinum.


# BRÚKIÐ MIÐLAHÚSIÐ



**Ring og hoyr nærri**

· Konsertir
· Fundir
· Framsýningar
og annað

miðlahúsið
í Vágsbotni

TÓRSGØTA 1 · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO
Sosialurin



SKEIÐ

## Rættan roknihátt, rættur kostnaður, betri úrslit

Í døgunum 5.-6. november frá kl. 9.00-16.00 báðar dagarnar skipar Landsverk saman við donsku fyritøkuni „Byggecentrum" fyri skeiðnum „Kalkulation – principper, metoder og værktøjer" á Hotel Hafnia í Havn. Skeiðið vendir sær í høvuðsheitum til fólk í byggivinnuni, og pláss er fyri 20 luttakarum.

**Tekning**
Boðast skal frá luttøku á jjo@lv.fo í seinasta lagi 10. september 2007. Vinarliga upplýsið arbeiðspláss, navn og starvsheiti.

**Kostnaður**
Skeiðið kostar kr. 5.000. Íroknað skeiðsgjaldið er skeiðstilfar og matur. Peningurin skal flytast á kontu nr. 9181-128.220.6 í Eik Banka í seinasta lagi 10. september 2007. Vinarliga viðmerkið „Byggecentrum skeið".

Avboð skal gevast skrivliga í seinasta lagi eina viku áðrenn skeiðsbyrjan. Verður avboð givið seinni, verða 50% at gjalda av kostnaðinum.

Lesið annars meira um skeiðið á www.landsverk.fo.

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega-, byggi- og havnamyndugleikauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og tyrlupallar.*

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*